Sosialurin FØROYABANKI

**Týsdagin 27. apríl kl. 19.00 í Miðlahúsinum** www.isi.dk



# Ítróttarháskúlin í Ikast

Ítróttarháskúlin Ikast greiðir frá, hvussu tað er at ganga á háskúla og samstundis íðka nógvan ítrótt. Kom og hoyr nærri um okkara fantastisku tilboð til føroysk lesandi – einans 750 kr. um vikuna (íroknað uppihald og undirvísing). Tilboðið er bert galdandi, um meldað verður til áðrenn 14. mai til heystskeiðið 2010.

**Skráin er hendan**
- Hvat er Ítróttarháskúlin Ikast – undirvísing, upplivingar, samanhald og frágreiðing
- Finn tað, tú ert góður til – lestrarfyrireiking, venjaraútbúgving og førleikamenning
- Liðsamarbeiði – spælaramenning, venjaraútbúgving, spælaraumbýting v.m.
- Møguleiki verður fyri at tosað um individuellar spurningar

**Hesi koma at greiða frá**
**Jesper Johnsen,** undirvísari við ábyrgd av hondbóltsakademinum (fyrrverandi ligavenjari hjá Horsens og FC Midtjylland, kvinnur, Europa Cup vinnari 2004, 1. deild. Venjari hjá Ikast, Skanderborg og Skovbakken).
**Jonas Dal Andersen,** undirvísari við ábyrgd av fótbóltsakademinum (fyrrverandi yrkisleikari í I FCM, 2. deild. Venjari hjá FC Midtjylland, UEFA A-licensvenjari).
**Rói Danielsen,** føroyskur næmingur á ISI fótbóltsakademinum (spælari í 2. deild, I FCM. Hevur áður spælt við AB)
**Joen Pauli Høgnesen,** føroyskur næmingur á ISI hondbóltsakademinum 2006/2007 (Spælir í V.Í.F. og hevur spælt í Team Ikast).
**Heidi Joensen,** føroyskur næmingur á ISI hondbóltsakademinum 2006 (Spælir við V.Í.F. Hevur spælt tríggjar A-landsdystir fyri Føroyar + U20 og U18 venjingarlandsdystir).




Sosialurin FØROYABANKI

**Í Miðlahúsinum mikukvøldið 28. apríl kl. 19.30**



# Føroysk vitan eftirspurd í Jakarta, Indonesia

Mikukvøldið 28. apríl 2010 kl. 19.30 verður áhugaverd framløga um hjálpararbeiði í Jakarta, Indonesia. Tað er Heilsumálaráðið saman við Gigni – heilsufrøði til børn & ung sum skipa fyri.

Frá 15. marts til 8. apríl 2010 vóru Ingvør Justinussen, varaleiðari og Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur frá Gigni – heilsufrøði til børn & ung í Jakarta sum konsulentar hjá Mercy Corps. Hetta var eftir áheitan frá Mercy Corps í samband við verkætlanina BEST-projekt í Jakarta.

Endamálið var at samskifta við, ráðgeva og stuðla myndugleikum, fakfólkum og Mercy Corps í arbeiðnum við at stovnseta eitt "sentur" grundað á konseptið Gigni í Føroyum, fyri at betra um heilsutænastuna til familjur við børnum í Norður Jakarta.

Hetta, saman við áhugaverdum myndum og filmsklippum verður at hoyra og síggja meira um í Miðlahúsinum, mikukvøldið 28. apríl kl. 19.30.






**Vinnarin í mars:** Emely Joensen, Miðvágur

# Vakurleiki og vælvera

- les meira á www.cosmeto.fo






## APRÍL-KAPPINGIN

**Hvønn dag í apríl mánaða** verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan týsdagin 11. mai 2010 kl. 10.00 og merki brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í apríl er eitt gávubræv frá viðgerðarstovuni Cosmeto í Havn.

Drigið verður í viku 20.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2 | | | | | | | | 8 |
| | | 9 | | | 6 | | | |
| | 7 | | 5 | | 2 | | 3 | |
| 7 | | | 9 | | 3 | | | 1 |
| | 9 | | | | | | 5 | |
| 8 | | | 4 | | 5 | | | 9 |
| | 6 | | 1 | | 7 | | 9 | |
| | | 2 | | | | 4 | | |
| 4 | | | | | | | | 3 |

Cosméto vakurleiki og vælvera

www.cosmeto.fo · Tel. 31 80 70

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í apríl**
Viðgerðir frá Cosmeto fyri
**Kr. 3.000,-**

SUDOKU




**Vakurleikaserfrøðingurin Kim Novaa vitjar Cosméto 28. og 29. mai. Bílegg tær tíð innan 1. mai.**

**Restylane • Botox • Permanent make-up • Peeling**

Lesa meira á heimasíðuni www.cosmeto.fo

Sosialurin